Lýsa eftir nýggjum aðalstjóra

Løgmansskrivstovan lýsir í dag eftir nýggjum aðalstjóra til nýggja Løgmálaráðið. Nýggi aðalstjórin fær hampiliga løn

STARVSETAN
Edvard Joensen

Søkt verður nú eftir aðalstjóra til nýggja Løgmálaráðið, sum samtykt varð at stovna, tá nýggja samgongan varð skipað.

Nýggi aðalstjórn skal hava ábyrgdina av at skipa nýggja Løgmálaráðið. Hann skal vera løgfrøðingur ella hava aðra samsvarandi útbúgving frá lærdum háskúla.

Nýggi aðalstjórin verður løntur sum hinir aðalstjórarnir í 39. lønarflokki í Tænastumannasáttmálanum, av tí at starvið er tænastumannastarv.

Hetta gevur honum við føstum viðbótum kr. 42.348,34 um mánaðan umframt eina viðbót upp á kr. 3.984,75 fyri at vera aðalstjóri.

Samanlagt fer nýggi aðalstjórin at fáa kr. 46.333,09 í fastari løn frá landskassanum hvønn mánaða. Ella 555.997,08 krónur um árið.

Fer at kanna úttalilsi hjá Heina O. Heinesen

– Ætlar hann at føra politikk í landsstýrismálanevndini, hevur hann misskilt uppgávuna og so hava vit ein stóran trupulleika, sigur Jákup Mikkelsen

POLITISK UMSITING
Áki Bertholdsen

– Ætlar formaðurin í landsstýrismálanevndini sær at gera mismun á landsstýrismonnunum, hevur hann grundleggjandi misskilt sína uppgávu.

Jákup Mikkelsen, limur í landsstýrismálanevndini, heldur Heini O. Heinesen, sum er formaður í nevndini, kann hava sett trúvirðið hansara í vanda.

Uppgávan hjá landsstýrismálanevndini er m.a at halda eyga við umsitingini hjá landsstýrisfólkunum, so at alt fer rætt fram.

Men í Sosialinum hósdagin segði Heini O. Heinesen, sum er nývaldur formaður í nevndini, at hann ætlaði at ansa serliga væl eftir Jørgin Niclasen, fiskimálaráðharra og hansara umsiting av fiskimálaráðnum.

Táið Jákup Mikkelsen kemur heim aftur úr útlondum, fer hann at fáa sær eitt prát við Heina O. Heinesen at vita, hvat býr undir úttalilsunum um at hann ætlar sær at ansa serliga væl eftir Jørgin Niclasen og hansara umsiting

Heini O. Heinesen hevur frætt, at ymiskt er í umbúna á fiskivinnuøkinum, sum er í stríð við lógina og tí ávaraði hann frammanundan Jørgin Niclasen ímóti at fyritaka sær nakað ólóligt, tí so fór tað at verða tikið upp í landsstýrismálanevndini alt fyri eitt.

Stórur trupulleiki

Hetta er fallið einum øðrum limi í landsstýrismálanevndini, Jákupi Mikkelsen, fyri bróstið.

Hann sigur, at tað hevur alstóran týdning fyri Landsstýrismálanevndina, at hon er fullkomiliga óheft av politikki.

– Landsstýrismálanevndin skal ikki brúkast til at føra politikk við. Tað er uppgáva hennara alt ov ávarsom til og tað er ógvuliga umráðandi, at ein slík nevnd ikki verður brúkt til at føra politikk í.

– Tað, sum Heini O, Heinesen sigur kann tískil hava sett trúvirðið hjá nevndini í vanda og tað er ein álvarsligur trupulleiki, sigur Jákup Mikkelsen.

Jákup Mikkelsen er staddur uttanlands í løtuni, men táið hann er heimafturkomin, fer hann at kanna málið og so tekur hann støðu útfrá tí. Kanska fer hann at taka málið upp í landsstýrismálanevndini, tað fer hann at hugsa um, táið hann er komin heim og hevur sett seg betri inn í tað.

– Tað er greitt, at táið eg komi heimaftur, fari eg at taka málið upp at vita, hvat liggur aftanfyri. Útfrá tí taki eg so støðu til málið víðari.

– Hevur formaðurin í nevndini frammanundan gjørt av at hava eitt serliga vakið eyga við tí eina landsstýrismanninum, hevur hann grundleggjandi misskilt sína uppgávu og so hava vit ein stóran trupulleiki.

Jákup Mikkelsen sigur, at tað er uppgávan hjá landsstýrismálanevndini at halda eyga við øllum landsstýrismonnunum og tað ber ikki til at pilka ein einstakan burturúr og kunngera, at nevndin fer at halda serliga væl eyga við honum.

– Við sínum 18 árum á baki sum løgtingsmaður, er Heini O. Heinesen aldursforseti í Føroya Løgtingi, so hann átti at vita betri, hann afturat.

Tað eydnaðist ikki at fáa fatur á triðja nevndarliminum í Landsstýrismálanevndini, Kaj Leo Johannesen, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Fara nú at gera útvarp í Suðuroy

Enn er óvist, nær vit fara at hoyra útvarpssendingarnar úr Suðuroynni, men tær fyrstu sendingarnar verða kanska longu í summar

LOKALVARP
Áki Bertholdsen

Tey, sum halda, at Suðuroyggin er er heldur forfjónað í almenna útvarpinum kunnu fegnast. Tí nú verður arbeitt við at senda útvarp úr Suðuroynni.

Tað er felagið Suðurrás, sum ætlar at senda lokalvarp úr Suðuroynni, men enn er óvist, nær farið verður undir sendingarnar.

Tó kann væntast, at tær fyrstu sendingarnar verða at hoyra longu í summar, men sendingarnar koma valla í eina fasta legu, fyrrenn einaferð í heyst.

Herfyri var felagið Suðurrás sett á stovn at standa fyri lokalvarpinum í Suðuroy. Suðurrás er eitt vanligt felag, har øll kunnu gerast limir fyri 100 krónur um árið.

Formaður í Suðurrás er Bjarni Johansen, næstformaður og skrivari er Dagfinn Olsen, kassameistari er Dennis Holm og nevndarlimir eru Djóni Eidesgaard og Búi Dahl, teir eru allir úr Vági.

Tað verður í erva í hesum húsinum mitt í Vági, at nýggja útvarpsstøðin í Suðuroy fer at halda til

Byrja varliga

Bjarni Johansen sigur, at í fyrstu atlogu er ætlanin at byrja við varsemi.

– Vit hava tosað við útvarp Føroya og haðani er stórur áhugi fyri at vit gera sendingar við tilfari úr Suðuroy, sum síðani verða sendar í útvarpinum upp á sama máta sum sendingar hjá Studio Pegasus í Klaksvík verða sendar.

Enn er ongin avtala gjørd við Útvarpið, men formaðurin í Suðurrás væntar, at hetta verður leisturin ta fyrstu tíðina í hvussu so er. Hann sigur, at talan verður ikki um tíðindasendingar sum so, men meiri um samrøður og upplýsandi tilfar og annað, sum hevur við Suðuroynna at gera.

Suðurrás hevur leigað høli í ovaru hæddini á handlinum Litbúðini, sum liggur dygst við høvuðsvegin, mitt í Vági.

Mikrofonir og onnur, teknisk útgerð til Suðurrás er bíløgd og Bjarni sigur, at hendan útgerðin kemur longu mánadagin og so verður farið at rigga eitt upptøkuhøli til.

Men hann dylir heldur ikki fyri, at endamálið er at fáa egnan sendara sum frálíður, so at Suðurrás kann fáa sendiloyvi og kann senda sjálvt so at tað eisini kann gerast eitt rættiligt lokalvarp fyri Suðuroynna. Samstundis ásannar hann, at hetta verður eitt ódnartak, tí tað er kostnaðarmikið og tí er enn óvist, um tað letur seg gera.

Á býráðsfundi mikukvøldið viðgjørdi Vágs Býráð eina umsókn frá Suðurrás um figgjarligan stuðul til tiltakið.

Býráðið samtykti einmælt at lata Suðurrás 30.000 krónur í stuðuli, sum verður latin felagnum sum eitt slag av íverksetarastuðuli.

Bjarni Johansen sigur, at ætlanin er eisini at søkja um stuðul aðrastaðni frá eisini, eitt nú frá kommunum og frá fyritøkum og virkjum.